




*Kris Kristoffersson svaraði høviskur spurningum, meðan hann helt leiðina mót móttøkufylginum av fyrireikarum, ið komnir vóru at føra hann til Havnar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Blíður Kris Kristoffersson komin til Føroya



TÓNLEIKUR

*dagfinn@sosialurin.fo*

Tað var av røttum eitt VIP flogfar, ið lendi í Vágum seinnapartin í gjár. Naser Khader og føroyski bólkurin 200, Guðrun og Guðrun og so sjálvandi countrylegandan Kris Kristoffersson.

Og hóast fylgið av verndarmonnum var til staðar í samband við nøkur av nevndu nøvnum, so svaraði Kris fryntliga spurningum, tá hann kom í Vága Floghavn.

So ymisk og tó, nevndi M. C. Restorff einaferð eina útgávu. Og hesi orð kunnu nýtast í samband við hetta flogfarið flogfarið. Tað var so ymiskt, hvørjum bíðað varð eftir; Khader ella vinum ella familju. Ella Kris!

Eitt hitt størsta navnið við flogfarinum var tó í hugaheiminum hjá mongum Kris Kristoffersson. Ein hetja innan film og country-tónleik.

Kris svaraði fryntliga teim spurningum, ið stundir vóru at seta honum, innan hann fór við føroyska móttøkufylginum av fyrireikarum.

Veðrið var av tí fagrasta í gjár, og hann segði seg fegnast um at koma til Føroya og um konsertina í kvøld var at siga, at tað verða tey góðu og gomlu løgini, ið verða at hoyra.

## Seyðahundakapping við Gjógv

Leygardagin 14. apríl verður skipað fyri seyðahundakapping norðuri við Gjógv. Hetta er fyrstu ferð at skipað verður fyri slíkari kapping við Gjógv.

Kappast verður í øllum trimum klassunum. Í klassa 1 eru teir yngstu hundarnir, sum ikki eru so nógv vandir. Í klassa 2 luttaka hundar sum eru nógv vandir, men sum framvegis hava ymiskt eftir at læra. Í klassa 3 eru bestu hundarnir í landinum. Hetta eru hundar sum eru ógvuliga væl vandir og sum kunnu sendast langt eftir seyði. Í kappingini við Gjógv verða teir sendir 400 – 500 metrar.

Byrjað verður miðskeiðis í Gjáardali klokkan 10.00. Fyrstu hundarnir sum kappast eru teir í klassa 3, ella teir allar bestu hundarnir. Tey sum ynskja at síggja hesar hundarnar mugu møta stundisliga klokkan 10.

Steyp og heiðursmerkir verða latin til nr. 1,2 og 3 í hvørjum bólki. Steypini eru latin av Føroya Shell. Steypini verða handað á Gjáargarði eftir lokna kapping. Í samband við steypahandanina verður okkurt leskiligt at fáa undir tonnina.

Dómari verður Hans Joensen.